# Bygdarráðsfundur

# Hvalbiar Kommuna

**Dagfesting:** 23.07.2018 kl. 17.30

Á fundi: Janus Thomsen
Eir J. Norðberg
Magni Bertholdsen
Niels Olaf Eyvindsson
Gunnhild Mortensen
Rúni Thomsen (fyri Niels Jacob Thomsen, ið hevur forfall vegna sjúku).
Sten Spange Larsen

Skrivari: Johanna B. Djurhuus

1. **Val av nýggjum limi og tiltakslimi í Kommunuvalnevndina í Hvalba og nýggjum limi í Kommunu- løgtings- og fólkatingsvalnevndina í Sandvík.**

   Kommunuvalnevndin í Hvalba**:**
   Súsanna Niclasen, formaður
   Niels Pauli Olsen
   Sunrid Olsen
   Tiltakslimir:
   Poul Laust Christiansen
   Poula Thomsen
   Halltóra Joensen
   Samtykt varð einmælt at velja Poul Laust Christiansen sum fastan lim fyri Niels Paula Olsen og Alice Tausen og Jóhan D. Nónstein sum tiltakslimir fyri Poul Laust Christiansen og Halltóru Joensen.

   Kommunu-, løgtings- og fólkatingsvalnevndin í Sandvík:
   Thorbjørn Joensen
   Richard á Hólum
   Emmy Klettheyggj
   Varalimir:
   Andrass N. Joensen
   Sverri Jacobsen
   Jenny Olsen
   Samtykt varð einmælt at velja Andrass N. Joensen sum fastan lim fyri Thorbjørn Joensen og Rakul Johannu Nielsen sum tiltakslim fyri Andrass N. Joensen.

2. **Val av føstum nevndum.**
   Óbroytt.

3. **Skriv frá borgara viðv. Sandvíkar skúla.**
   Skriv í sambandi við at gera eina stovu í Sandvíkar skúla til minningarrúm fyri Martin Joensen.
   **Avgerð:**
   Samtykt við seks atkvøðum fyri, at Trivnaðarnevndin arbeiðir víðari við málinum.

4. **Kostnaðarmeting viðvíkjandi girðing í skúlagarðinum.**
   Kostnaðarmeting av tilfari og arbeiðsløn til girðing í skúlagarðinum kr. 47.750,- og girðing millum sparkivøllin og skúlagarðin umleið kr. 12.000,- til viðgerðar.
   **Trivnaðarnevndin 19.07.2018 og Fíggjarnevndin 20.07.2018:**
   Báðar nevndirnar mæla bygdarráðnum til at taka av hesum tilboði.
   **Avgerð:**
   Einmælt samtykt at fylgja tilmælunum frá nevndunum.

5. **Lektiuhjálp.**
   Fyrispurningur frá skúlastjóranum um lektiuhjálp til skúlan aftaná summarfrítíðina.
   **Trivnaðarnevndin 19.07.2018 og Fíggjarnevndin 20.07.2018:**
   Mælt verður til at játta lektiuhjálpina.
   **Avgerð:**
   Einmælt samtykt.

6. **Ískoyti til sáttmála um skúlabarnaflutning – Strandfaraskip Landsins.**
   Ískoyti til verandi sáttmála til viðgerðar, soleiðis at hesin verður longdur til 30. apríl 2019 undir óbroyttum treytum.
   **Trivnaðarnevndin 19.07.2018 og Fíggjarnevndin 20.07.2018:**
   Mælt verður til at taka undir við ískoyti til sáttmála.
   **Avgerð:**
   Einmælt samtykt.

7. **Kommunala samstarvið á eldraøkinum - eftirmeting.**
   Tá eldraøkið varð lagt út til kommunurnar at umsita í 2015, varð ásett í løgtingslóg, at økið skuldi eftirmetast í 2020. Henda eftirmeting er framskundað til 2018.
   **Fíggjarnevndin 20.07.2018:**
   Fíggjarnevndin hevur bert ta viðmerking, at afturberingin til eldraøkið skuldi verið goldin samstarvinum heldur enn hvørjari kommunu sær.
   **Avgerð:**
   Samtykt varð einmælt at fylgja tilmælinum hjá Fíggjarnevndini og at hildið verður fram við samstarvinum á eldraøkinum.

**8. Byggimálsviðgerð.**

Uppskot um lýsing eftir byggimálsviðgera til Hvalbiar Kommunu.

**Avgerð:**

Samtykt varð einmælt at lýsa eftir byggimálsviðgera sambært uppskoti um lýsing.

**9. Ikki almenn mál.**

Fundarbókin lisin og skrivað undir. Fundur lokin kl. 19.30

Janus Thomsen Eir J. Norðberg Magni Bertholdsen

Gunnhild Mortensen Sten Spange Larsen Niels Olaf Eyvindsson Rúni Thomsen